# Vista merkir ikki teldusøluna




Nýggja útgávan av Windows, Windows Vista, hevur ikki megnað tað, ið tað var sett til. Sølan av teldum er als ikki hækkað, síðan framkomna útgávan er útkomin. Microsoft væntar tó, at sølan fer at hække seinni í ár. Kanningar vísa, at sølan fer at vaksa við 11 prosentum.

# Mannaátarar handtiknir

Í Belgia hevur løgreglan handtikið tveir mannaátarar, ið høvdu ætlarnir um at eta eina kvinnu, sum teir høvdu hildið sum gísla. Teir báir menninir, sum eru frá býnum Ghent, vóru báðir ávirkaðir av ógvusligum filmum, og allarhelst var tað hetta, ið fekk teir at leggja hesar ógvusligu ætlanirnar.

# Fa. Ellen Dahl í søguna




*Í 1978 tók Solveig við og hevur hon havt fyritøkuna, til lykilin endaliga varð snaraður mikudagin.*

**Fa. Ellen Dahl er gamalt firma í Vági, men mikudagin fór hurðin afur fyri seinastu ferð, og hetta hendi um somu tíð, sum stovnarin hevði fylt 100 ár**

SØGULIGT FIRMA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Solveig Johansen hevði opið fyri seinastu ferð mikudagin í handlinum Fa. Ellen Dahl, sum hon førdi víðari, tá mamma hennara legði frá sær. Sostatt fer hesin gamli handilin í Vági nú í søguna.

Tað var Ellen Dahl, sum byrjaði virksemið í 1930. Flutt varð tó ikki í núverandi húsini, fyrr enn í 1935.

### Fotografur

Ellen Dahl lærdi til fotograf og hon hevði atelier í kjallaranum og seldi eisini gávulutir. Frá 1949 seldi hon eisini vikubløð. Kioskin kom í 1958.

Solveig sigur, at tá hon jú búði í húsinum, so hjálpti hon til í handlinum og arbeiddi nógv har, men í 1961 giftist hon Eyðuni Johansen, og tey búðu niðri tvey tíðarskeið.

Í 1978 tók Solveig við og hevur hon havt fyritøkuna, til lykilin endaliga varð snaraður mikudagin.

### Søguligur handilsgluggi

Spurd, um tað er við sorgblídni, hon nú leggur frá sær, sigur Solveig, at tað er ikki við sorgblídni, tí tað er gott at gevast, meðan ein enn orkar og ein skal duga at finna hurðina sjálvur.

Her hava verið nógvir góðir og trúgvir kundar og stuttligt hevur eisini verið at fylgt skúlabørnum og øðrum børnum uppeftir, til tey seinni kanska gjørdust studentar, sigur Solveig.

Handilin liggur á høvuðsvegnum í Vági tætt við skúla og bryggjuøki, og mong eru tey, sum eftir arbeiðstíð ella halgidagar, hava lagt leiðina framvið, fyri at skoða handilsvindeyguni, ið sum oftast hava verið prýdd í samband við okkurt sermerkt høvi. Ikki bara føstulávint ella jólini hava sett dám á, men eisini meira persónligir dagar, so sum brúdleyp, rundir føðingardagar og annað, og ofta hava myndir úr stóra og gamla myndasavninum verið forvitnisligt ískoyti í handilsvindeyganum, so at talan bæði hevur verið um handilsglugga, og ein glugga aftur í farnar tíðir.

Ellen Dahl hevði fylt 100 ár 20. juni.

- So nú var líkasum so hóskandi at gevast, sigur Solveig Johansen.handilsvindeyganum, so at talan bæði hevur verið um handilsglugga, og ein glugga aftur í farnar tíðir.

# Jógvan á toppinum í Íslandi

**Í tvær vikur hevur Jógvan Hansen ligið fremstur á topplistanum fyri mest seldu fløgur í Íslandi. Fløgan fær stak góða móttøku og Jógvan hevur undanvind. Í summar vitjar hann heima í Føroyum á Summarfestivalinum við tónleikarunum úr X Factor, sum var sjónvarpskappingin, ið sendi Jógvan á ferð millum stjørnurnar**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Nú er nakað síðani, at Jógvan Hansen úr Klaksvík vann sangkapping í íslendska sjónvarpinum. X Factor nevndist sendirøðin og tá Jógvan vann, gjørdist hann landskendur í Íslandi.

Síðani er fløga givin út og hendan liggur nú nummar eitt yvir mest seldu fløgur í Íslandi.

Jógvan sigur, at talan er um løg, sum bæði íslendskir, bretskir og føroyskir tónasmiðir hava gjørt, men eisni kenna føroyingar nøkur løg aftur, tí m.a. lagið Rooftop, sum Jógvan sang saman við Aria, er við á fløguni.

- Hetta er mín fyrsta soloætlan. Eg havi jú annars givið út saman við Aria og Kulum Rótum. Men nýggja fløgan er at fáa í Føroyum nú.Tað eru løgini Keep on searching og Rooftop, sum í stóran mun hava borið fløguna, so tað er stuttligt, at føroyskt ískoyti kann gera mun, sigur Jógvan.

Hann er sera glaður fyri fløguna, sum er stórfingin, hóast hon er rólig og symfoniorkestur er við, eins og tónleikarar úr Nashville. Tað eru eisni framleiðarar, sum hava arbeitt saman við heimskendum stjørnum, sum hava verið við at framleitt fløguna hjá Jógvani. Fløgan er úrslit av, at hann vann X Factor.

### Á Summarfestival

Jógvan vitjar í Klaksvík á Summarfestivalinum í Summar og tað verður saman við tónleikabólkinum, sum spældi undir í X Factor.

- Eg spæli fyribils bert á Summarfestivalinum, hóast áhugin er stórur at fáa meg at spæla í Føroyum, men hvat hendir eftir Summarfestivalin er ilt at siga. Møguliga spæli eg meira í heyst, sigur Jógvan.

### Gott í Íslandi

Jógvan hevur ongar ætlanir um at flyta aftur til Føroya úr Íslandi.

- Eg havi tað gott í Íslandi. Tað gongur sera væl tónleikaliga og so havi eg eina risastóra hárfríðkanarstovu eisni. Eg havi ikki eina leysa stund, fyrr enn í september, sigur Jógvan Hansen.

- Tað er kanska tað eg sakni eitt sindur úr Føroyum; hetta at hava hava tíð, sigur ein annars væl nøgdur Jógvan Hansen úr Reykjavík.